# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

12. september fingu Eyðvør á Fløtti og Rene Thomsen, Korinth, Fyn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4268 gr.

14. september fingu Linda Hansen og Poul Nolsøe Sørensen, Norðragøtu, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3300 gr.

15. september fingu Inger Olsen og Kári Troest, Saltangará, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3450 gr.

15. september fingu Joan Jacobsen, Skopun, og Magni Jacobsen, Glyvrum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4110 gr.

16. september fingu Elisabeth Henriksdóttir og Brian Anthoniussen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4400 gr.

18. september fingu Lis og Atli Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

19. september fekk Sóley Joensen, Glejbjerg, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

19. september fingu Astrid og Hans Meinhard Midjord, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4200 gr.

20. september fingu Marianna og Høgni Hansen, Fuglafirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3900 gr.

20. september fingu Pernille Krogh, Miðvági, og Óli Reynskor, Sørvági, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 5275 gr.

21. september fingu Marjun og Krissfinn Lydersen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3970 gr.

21. september fingu Erik Johansen og Olfa Trabelsi Johansen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3500 gr.

23. september fingu Jórun A. Viderø og Eyðun Nielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4450 gr.

23. september fingu Eyðbjørg og Erik Lervig, Leirvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4220 gr.

23. september fingu Joan Djurhuus, Hvalvík, og Fríði Danberg, Vágur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3560 gr.

23. september fingu Rósa Maria og Martin Brodersen, Tórshavn, tvíburðar, son og dóttur. Gentan var 51 cm long og vigaði 3220 gr, drongurin 49 cm langur og vigaði 2470 gr.

24. september fingu Joan á Fløtunum og Eyðun Christiansen, Lamba, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3950 gr.

## Andlát

16. september
Jákup Hermansen, Leynar, 57 ár
18. september
Marit Christiansen, á Kirkju, 80 ár
21. september
Kristianna Suggate,fødd Petersen, ættað av Steig í Sandavági, búsitandi í London,84 ár
Petur Arge Nielsen, vanliga nevndur Petur hjá Niels í Heiðunum, 85 ár
Páll Narve, føddur í Tórshavn, búsitandi í Frederiksberg, 69 ár
23. september
Clara Nielsen, Vestmanna,76 ár

# Niels Pauli Djurholm 90 ár



Hósdagin 25. september fylti Niels Pauli Djurholm, Kollafirði, níti ár. Hann er føddur á Glyvrum, sonur Hans Djurholm, navigatiónsskúlalærara og skipasýnismann og Inger f. Weihe av Selatrað. Teir vóru tveir brøður. Lassen doyði í 1992.

Niels Pauli tók læraraprógv í 1935 og var lærari á Toftum og í Gøtu, áðrenn hann gjørdist lærari í Kollafirði í 1937. Frá 1949 til hann fór úr starvi í 1981, var hann fyrstilærari í Kollafirði. Hann er kendur fyri at hava verið ein sera nærlagdur og dugnaligur lærari. Lærarastarvið var fyri hann eitt kall, sum hann røkti samvitskufult. Í 1957-58 var hann á ársskeiði í Danmark.

Umframt at vera lærari, røkti hann fleiri álitisstørv. Frá 1949 og næstu 30 árini var hann organistur í kirkjuni í Kollafirði, umframt, at hann bæði var limur í sóknarstýrinum og í meinigheitsráðnum. Í sínum virkna felagslívi, var hann millum teirra, sum stovnaðu Kollafjarðar Ítróttarfelag. Hann var eisini kommunuskrivari í Kollafirði í útvið 30 ár.

Niels Pauli fekk sær konu úr Kollafirði. Gunda hevur verið honum ein góður stuðul. Kommunuskrivstovan var í heimi teirra, so har kom nógv fólk á gátt, og mangur drekkamuður var skonktur.

Har varð kommunuskatturin álíknaður, og Djurholm, sum hann vanliga verður nevndur, stóð eisini fyri at heinta inn hendan skatt.

Tey veittu eisini kollfirðingum aðrar tænastur t.d. at skriva testamenti, sjálvuppgávur, ognaruppgerðir, umsóknir o.m.a. Teirra heim var eitt opið stað fyri tey, sum høvdu hjálp fyri neyðini og søktu sær góð ráð.

Har vóru mál avgreidd, sum í dag krevja fleiri ársverk á stovnum, sum ikki geva tað inniligu, persónligu og vinarligu viðgerð, sum tey góðu gerandis sum heilagt, á morgni sum seint á kvøldi. Tá var einki, sum æt frá kl. 8 til 16.

Honum dámar væl náttúruna, og so leingi hann orkaði, gekk hann mangan túrin frá Sjógv til Vestmanna, tá hann kom á vitjan. Yvir hundrað ferðir hevur hann verið uppi á Árnadalstindi.

Niels Pauli hevur altíð dámt væl at lisið, og hevur vitjað nógv Landsskjalasavnið. Í nógv ár hjálpti hann Páll Nolsøe við Siglingarsøguni, har hann eisini fær tøkk fyri stuðulin í fororðunum til seks tey síðstu bindini. Har verður eisini víst á, at hann átti ein stóran part av tilfarinum í bind 14. Eisini hevði hann rættlesturin av teimum fimm síðstu bindunum.

Nú verfaðir er farin um tey níti árini, vil eg takka fyri tað, tit hava verið og eru fyri meg og mína familju, við bestu ynskjum um eitt framhaldandi gott lívskvøld.

**Øssur**

## Jón Johansen 40 ár



Í dag, leygardagin 27. september, fyllir Jón Johansen í Havn 40 ár. Jón er føddur og uppvaksin í Havn, sonur Theu, f. Joensen, úr Hesti og Karl Johansen, Karl hjá Talis, úr Havn.

Jón er útbúgvin bilmekanikari, hann lærdi hjá Frits Jensen í Gundadali. Áðrenn hann fór í læru, var hann ørindadrongur hjá Tórshavnar Kommunu ein tíð. Hann arbeiddi sum postboð í umleið fimm ár, áðrenn hann í umleið 1989 fekk starv sum oljufýrservicemaður hjá Shell.

Hann er B36´ari sum tey flestu á Abbatrøð, umframt tað er hann næstformaður í B36. Eisini var hann í fleiri ár startdómari hjá Róðrarsambandinum. Hann er eisini virkin í politikki og er kassameistari í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag. Honum dámar sera væl at fáast við kríatúr, og hevur hann seyð, gæs og dunnur á Ternuryggi.

Jón er giftur við Tóru Poulsen úr Nólsoy og eiga tey fýra børn, Julian 13 ár, Rannvá 10 ár, Elsa 8 ár, og Karl 3 ár.

Føðingardagin heldur Jón í Keypmannahavn saman við konuni.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Bent Mortensen 70 ár



Sunnudagin 28. september fyllir Bent Mortensen í Vági 70 ár. Bent er føddur og uppvaksin í Vági. Foreldrini vóru, Bette, f. Nielsen, úr Vestmanna, og Palli Mortensen, vanliga nevndur Argja Palli, ættaður av Argjum.

Sum 14 ára gamal fór Bent í smiðjulæru hjá pápanum, sum hevði smiðju í Vági. Í 1953 fór hann til Danmarkar á Haslev Håndværkerhøjskole, har hann gekk veturin 1953-54. Í 1954-55 arbeiddi hann á maskinverksmiðjuni hjá Burmeister & Wain í Keypmannahavn. Í 1955-56 sigldi hann við trolara, og í 1958 tók hann maskinmeistarprógv, 1. part.

Í 1960 kom Bent aftur í starv í smiðjuni hjá pápanum, Palla Mortensen, og í 1976 yvirtók hann virkið, sum í dag kallast P/F Tangavirkið í Vági. Á virkinum arbeiða í dag 10 mans. Umframt alt vanligt maskinarbeiði hava teir millum ár og dag gjørt nógvar ketlar til oljufýringar og tangar í øllum støddum. Bent var í nógv ár nevndarlimur í Vágs Handverkmeistarafelag. Bent var giftur við Jonnu, f. Dam, úr Porkeri, sum doyði í 1972, tey fingu fimm børn. Í 1975 giftist hann uppaftur við Katu, f. Skorastein, ættað úr Leirvík, sum eigur ein son. Tey eigur 14 ommu- og abbabørn.

# Lene Rauff Nielsen 50 ár



Í dag, leygardagin 27. september, fyllir Lene Rauff Nielsen í Hoyvík 50 ár. Lene er fødd í Brande í Jútlandi, dóttir Rigmor og Hans Rauff Nielsen.

Eftir at havið tikið HF-prógv lærdi hon til sosialráðgeva í Odense og var liðug í 1976, tá hon kom til Føroya og arbeiddi á kriminalforsorgini í 1976-77.

Eftir tað fór Lene aftur til Danmarkar, har hon arbeiddi sum sosialráðgevi í Odense til 1985, tá hon flutti til Føroyar at búgva og fekk arbeiði á Almannastovuni, har hon starvast enn í dag. Í nøkur ár var hon eisini nevndarlimur í Sosialráðgevarafelag Føroya.

Lene er gift við Jógvan Dahl, studentaskúlalærara. Tey búgva í Hoyvík og eiga tvey børn, Hannu, sum er 22 ár, og Martin, sum er 19 ár.

Lene verður ynskt hjartaliga tillukku við 50 ára føðingardegnum.

**starvsfelagarnir**

# 30 ár í Kristnastovu

30 ár eru liðin síðan nakrir ungir føroyingar eitt fríggjakvøld fyrst í september 1973 hittust til eina samkomu á Oxford Allé 3A úti á Amager. Hetta var byrjanin til eitt evangeliskt útisetaverk, sum fekk navnið Kristnastova. Tað vóru tey bæði Susan og Øssur Berghamar, sum vóru flutt úr Føroyum til at arbeiða millum føroyingar í Keypmannahavn.

Susan er fødd og uppvaksin í Hounslow uttan fyri London. Sum ung gekk hon á Moorlands bíbliuskúla, har fleiri føroyingar eisini hava gingið.

Øssur er úr Havn, foreldrini vóru: Tinna, f. Hansen, av Toftum, og Sigurd Berghamar úr Havn. Øssur er útbúgvin skrivstovumaður og hevur t.d. arbeitt í Sjóvinnubankanum, á skrivstovuni á Landssjúkrahúsinum og á bilasølu.

Susan og Øssur møttust í Onglandi, og tey giftust í Onglandi í 1970.

Nógvir føroyingar búðu í Keypmannahavn í 1973, men tó munandi minni enn í dag. Flogsamband við Føroyar var bert tríggjar ferðir um vikuna, flogið var við Fokker Friendship propellflogførum, og tað tók fýra tímar at flúgva millum Føroyar og Danmark.

Nakað av kristiligum virksemi var millum føroyingar í Keypmannahavn hesa tíðina. Føroyskar gudstænastur vóru hildnar í Sámuelskirkjuni í Thorsgade, og longur niðri í gøtuni var danska brøðra-samkoman, har mánaðarlig føroysk møtir vórðu hildin.



*Øssur og Susan Berghamar hava verið leiðarar í Kristnastovu í 30 ár*

Hóast hesi tiltøk var tørvurin á einum miðvísum arbeiði millum føroyingar í Keypmannahavn, eitt stað, har føroyingar kundu venda sær við bæði andaligum og sosialum spurningum.

Einki hotel var fyri føroyskar sjúklingar og teirra avvarðandi, sum komu niður í sjúkraørindum, og eingin almenn føroysk ráðgeving, sum vit kenna hana í dag.

Síðani arbeiðið í Kristnastovu byrjaði, hava vitjanir millum føroyskar sjúklingar á Rikissjúkrahúsinum verið fastur táttur av virkseminum.

Virksemið á Oxford Allé vaks nógv hesi árini og skjótt blivu hølini ov lítil. Í 1979 vórðu eini størri hús keypt á Birmavej 36 á Amager, sum vóru væl egnað til endamálið.

Síðan virksemið byrjaði hava fríggjakvøldssamkomurnar í Kristnastovu verið nógv vitjaðar. Eisini eru møti og sunnudagsskúli sunnudagar. Føroyski presturin í Keypmannahavn og Kristnastova skiftast um at hava andaktir á Hotel Tórshavn aðru hvørja viku. Av og á er eisini samkoma fyri eldri føroyingar.

Kristnastova skipar hvørt ár fyri legum fyri føroyskar útisetar ymsastaðni í Danmark.

Susan og Øssur hava verið við frá byrjan og eru enn virkin í Kristnastovu.

Tey eiga tveir synir, Andrew, sum hjálpir til í arbeiðinum í Kristnastovu og Kristin Filip, sum býr í Randers. Susan og Øssur eiga fimm barnabørn.

Í sambandi við at 30 ár eru liðin síðan hetta arbeiði millum føroyingar í Keypmannahavn byrjaði, verður stevnudagur fyri fyrrverandi útisetar í samkomuhúsinum Siloa í Fuglafirði í dag.

## Dagurin

**27. september. Kosmus** (eisini skrivaður Cosmas), deyður í umleið ár 300. Tikin av døgum undir Diocletianus keisara.

**28. september. Venceslaus,** deyður í 935. Sonur hertogan Vratislav í Bøhmerlandi. Av øvund læt heidni bróðirin Boleslav hann myrða. Gjørdist verndarhalgimenni hjá Bøhmen og er jarðaður í Sankta Vensils Kapelli í Vituskirkjuni í Prag, sum er bygd oman á toftunum av tí rotundu, sum hann sjálvur læt byggja.

Føroyska navnið er Vensil. Hammershaimb-ættin kemur úr Bøhmerlandi,og Wensil próstur skrivaði navn sítt Venceslaus Ulricus Hammershaimb (1819-1909).

Navnið er slaviskt og merkir hin heiðurskrýndi.

*Lucas Debes deyður hendan dagin í 1675, 52 ára gamal.*

**29. september. Mikkjalsmessa.** Dagur hildin høvuðseinglinum Mikael til heiðurs. Ein av teimum mishalgidøgunum, sum nógv hevur verið hildið um í Føroyum, serstakliga av tí hann hevur verið so nær knýttur at seyðahaldi. Líka í hesi øldini vita fólk um at siga, at lestur hevur verið lisin mikkjalsmessudag eftir teksti úr Opinberingini (12, 7-12)
Dilkadagur.
Bíbilska navnið merkir *hvør er sum Harrin.*